# Barrett og DR Big Band




Tónleikarin og undirhaldarin Sigurd Barret, sum fyri kortum var í Føroyum og hevði fleiri framførslur, fer í desember mánaði at undirhalda smáum og stórum saman við Danmarks Radio Big Band.

Sigurd er framúr góður undirhaldari, og hann hevur seinni árini verið nógv frammi í donsku sjónvarpi, har hann ger sendingar til børn. Konsertirnar, sum hann fer at hava í desember mánaði, eru eisini gjørdar við børnunum í huga.

Sigurd dugir væl at spæla og syngja sjálvur, men tað verður enn meira tyngd í tónleikinum, nú DR Big Band eisini fer at spæla saman við honum. Big bandið hjá Danmarks Radio spælir nógvar konsertir, og oftast hava tey solistar afturat sær. Eivør Pálsdóttir hevur verið ein av solistunum sum DR Big Band hevur havt konsertir saman við.

Tónleikurin á konsertunum við Sigurd Barrett verður léttur og svingandi jazztónleikur. Nógvir av teimum kendu sangunum frá barnasendingunum á DR verða eisini framførdir í nýggju hami, og fleiri av djórunum, sum eru við í barnasendingunum, verða eisini til staðar í sambandi við konsertirnar.

Sigurd Barrett og DR Big Band fara at hava konsertir í Keypmannahavn, Slagelse, Holbæk, Svendborg, Viborg og Randers.

Fullfíggjað skrá er at finna á www.dr.dk/bigband

























